UTTANRÍKIS- OG MENTAMÁLARÁÐIÐ

Løgtingið
Tinghúsveg 3
100 Tórshavn

Dagfesting: **5. mai 2021**
Tygara ref.**:**
Máltal.**: 19/00017-144**

Svar

upp á

skrivligan fyrispurning nr. 52-127/2020 eftir § 52 a í tingskipanini frá Bjarna Kárason Petersen, løgtingsmanni, settur Jenis av Rana, landsstýrismanni í uttanríkis- og mentamálum.

Fyrispuringurin er um lofteftirlitsradarin og er soljóðandi:

1. Kann landsstýrismaðurin vátta, at ongin avgerð – hvørki formlig ella óformlig – er tikin av føroyskum og/ella donskum myndugleikum um lofteftirlitsradaran, sum eftir ætlan skal setast upp á Sornfelli?
2. Kann landsstýrismaðurin vátta, at endaliga avgerðin um at seta upp lofteftirlitsradara á Sornfelli verður tikin í Løgtinginum ígjøgnum løgtingssamtykt ella aðra løgtingsfyriskipan?
3. Metir landsstýrismaðurin, at avgerðin um lofteftirlitsradaran kemur undir § 52 stk. 2-3 í stýrisskipanarlógini, har ásett er, at landsstýrið ikki kann gera avtalur, sum krevja luttøku Løgtingsins fyri at verða útintar, ella sum annars eru týdningarmiklar?

Svar

Til 1: Ja, landsstýrismaðurin kann vátta, at eingin avgerð er enn tikin um at seta upp nýggjan lofteftirlitsradara í Føroyum.

Til 2 og 3: Higartil hevur ikki verið mett, at málið eigur at verða viðgjørt eftir § 52 í stýrisskipanarlógini, men at avgerðin um at seta upp nýggjan lofteftirlitsradara kemur undir § 54 og § 54 stk. 2. Hetta tí at avgerðin tekur støði í samráðingum um eitt mál, ið hevur týdning fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum og eitt mál, ið hevur uttanríkispolitiskan týdning fyri Føroyar. Tvær ráðførslur og eitt samráð hava verið við Løgtingsins uttanlandsnevnd um málið, og endalig avgerð verður í fyrsta lagi tikin eftir enn eina ráðførslu.

Vinarliga

Jenis av Rana
landsstýrismaður